

*Tað verður Tórshavnar Manskór, ið sum tey fyrstu taka nýumvælda salin í Norðurlandahúsinum í nýtslu*

## Fyrsta konsertin í nýggja salinum

**Leygardagin fer Tórshavnar Manskór at taka nýumvælda salin í Norðurlandahúsinum í nýtslu**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Tórshavnar Manskór hevur verið sera virkið síðani 1987, og hevur kórið havt nógvar konsertir og tikið lut í ymsum tiltøkum so sum jarðarferðir, jólaløtur uppi á Lágargarði, fimleikaframsýningar, kórstevnur, komponistakapping, konsertir, útgivið tvær fløgur, skipað fyri einari manskórstevnu og ikki minst nakrar uttanlandsferðir.

Ferðír til útlandið hava m.a. verið: 1993 í Íslandi, har sungið var saman við Karlakóri Reykjavikur. 1994 í Danmark, Onglandi, Skotlandi og Wales, har kórið luttók í einari manskórkapping (Llangollen International Musical Eisteddfodd), og kom kórið har á eitt 6. pláss. 1996 í Hetlandi. 1997 Konsertferð í Baltisku londunum: Estlandi, Letlandi og Litauen. 2000 luttók kórið á Internationalari kórkapping í Linz í Eysturríki, og var hesaferð talan um eitt silvurmerki. 2003 luttók Manskórið til eina manskórskapping í Cornwall í Onglandi, har kórið fekk eitt bronzumerki.

Eisini hevur kórið fleiri ferðir, sungið saman við íslendskum kórum, bæði í Føroyum og í Íslandi. Hetta var millum annað, tá kórið var á konsertferð í Íslandi í 1993, tá sungið varð saman við Karlakóri Reykjavíkar. Karlakór Reykjavíkar var á vitjan í Føroyum í 1995, har teir høvdu nakrar konsertir í Norðurlandahúsinum, har Tórshavnar Manskór luttók. Tórshavnar Manskór hevur havt konsertir í Føroyum í 2003 saman við Karlakórinn Jøkull og Karlakórinn Fóstbræður, og í mei 2004 vórðu hildnar tvær konsertir saman við Karlakórinn Ernir, ein í Fuglafjarðar Kirkju og ein í Norðurlandahúsinum. Á vári í ár var Karlakór Rangæinga á vitjan í Føroyum. Tá var ein konsert hildin í Vesturkirkjuni.

Reportoirið hjá Tórshavnar Manskóri hevur síðani 1986 ligið um einar 100 sangir á ellivu ymiskum málum: føroyskum, íslendskum, norskum, svenskum, donskum, týskum, fronskum, eingilskum, grønlendskum, russiskum og latínskum. Men høvuðsdenturin hevur verið lagdur á tað upprunaliga føroyska tilfarið, - tí syngja føroyingar ikki tað sindrið, sum er á føroyskum, hvør skal so gera tað? Mozart, Verdi, Brahms og aðrar mætar komponistar kanst tú hoyra sungnar allastaðni í verðini, - og ofta eitt sindur betur, enn føroyingar kunnu syngja teir. - Men hvør kann syngja "Kvæði fremsta framtakskappa landsins" uttan vit føroyingar.

Seinni nú í oktober mánaði fer Tórshavnar Manskór til Íslands á konsertferð, og verða konsertir hildnar bæði í Reykjavík og ymsastaðni á Íslandi.

# – Gott men strævið arbeiði

**Vit tosaðu við tveir praktikantar á Hotel Hafnia, Torgunn á Løgmansbø úr Miðvágs- Sandavágs skúla og Sonju Ottosen úr Felagsskúlanaum á Oyrarbakka**

STARVSVENJING
*Kirstin Khaliqhey og Rannveyg F. joensen*



*Sonja Ottosen stendur við einum stórum brosi í køkinum, og ger matin kláran til gestirnar.*



*Her funnu vit Torgunn á Løgmansbø millum allar grýturnar, har hon gjørdi klárt til ein lekkran rætt*

Vit gingu frá Miðalhúsinum oman til Hotel Hafnia.

Vit vóru ikki so staðkendar á hotellinum, men við hjálp frá arbeiðsfólkinum funnu vit tær at enda í køkinum.

Tær vóru heldur bilsnar av at síggja okkum koma inn við myndatóli og einum blokki.

- Nei, tit fara ikki at taka bílæt av okkum!, var eitt tað fyrsta tær søgdu.

Men vit fingu tó loyvi at taka bíløt meðan tær gjørdu seg lidnan við matin. Síðani prátaðu vit eitt sindur við tær, og spurdu tær nakrar spurningar um hvussu tær dámdu at arbeiða á hotellinum og tílíkt.

- Eg visti ikki ordiliga hvat eg skuldi velja, siga tær báðar næstan við einum munni.

Teimum dámar væl á hotellinum, tí har eru nógv fitt starvsfólk, men tær halda arbeiðið vera heldur strævið.

Tá vit spurdu tær um hetta var teirra framtíðar yrki, vóru tær ikki heilt vísar í tí.

- Men tað er kanska verið ein møguleiki, tí tey sum arbeiða her fáa ókeypis kips og sodavatn, sigar tær við einum stórum brosi.

Vit takkaðu síðani fyri prátið og lótu tær fara aftur til arbeiðis.

# Oljuprísurin kann hækka heilt nógv

**Verður talan um kaldan vetur í USA, kann oljuprísurin lættliga bæði tví- og trífaldast**

OLJUPRÍSIR
*Jákup Mørk*



*Tað kann væl verða, at kostnaðurin av at fylla oljutangarnar verður nakað nógv hægri í vetur*

Mynd: Jens Kristian Vang

Soleiðis sigur amerikanski búskaparfrøðingurin og analytikarin, Matthew Simmons. Fyri stuttum viðgjørdu vit á vinnusíðunum í Sosialinum bók hansara, Twilight in the Desert, sum hevur fingið nógva umrøðu kring allan heimin. Ikki minst, tí høvuðsboðskapurin í hesari er, at oljuprísirnir í veruleikanum eru alt ov lágir.

Á fyrilestri í Ottawa í seinastu viku, greiddi Simmons frá, at ódnirnar, Katrina og Rita, uttan iva kunnu framskunda príshækkingarnar, sum kortini fara at koma.

Ódnirnar framdu stórar oyðileggingar í Mexicanska Golfinum, og enn restar nógv í, áðrenn framleiðslan er komin á somu hædd aftur.

Tí sigur Simmons, at trýstið á oljuprísin í vetur kann gerast øgiligt. Serstakliga kann støðan gerst heilt ótolandi, um talan verðu um ein kaldan vetur í USA. Tá vil skipanin við náttúrugassi verða ovbyrjað, og so fer prísurin mest sum á flog, staðfestir hann.

# Gamlar hetjur og nýggir risar í Glitni

Bjarni og Rakul, Kolbein Simonsen og Sámal Ravnfjall og Holgar og Villmenn fara hetta vikuskiftið á pallin í Glitni. Glitnir roynir at sláa navnið fæst sum nýggja spælistaðið í Havn.

Vikuskiftið byrjar longu í hóskvøldið klokkan 21.00, tá Bjarni og Rakul fara á pallin at fjálga um gestirnar í Glitni. Tónleikurin verður sambært Glitni undirhaldstónleikur, sum hoyrir einum hugnaligum og vælеydnaðum hóskvøldið til.

Fríggjakvøldið eru tað tveir av teimum mest garvaðu tónleikarunum á føroyska tónleikapallinum, bassmeistarin Kolbein Simonsen og tann føroyski Neil Young og Bob Dylan í sama pakka, Sámal Ravnsfjall, sum fara at spæla. Teir munnu hava eina tí mest umfatandi spæliskránna í Føroyum og kunnu vanliga tillaga seg til næstan ein hvørja áskoðarafjøld. Kvøldið byrjar kl. 23.00 og er unplugged.

Leygarkvøldið verður fótbóltsdansur við Føroya meistarunum í vágasoundi, Holgari og Villmonnum. Teir hava eru í harðari venjing til Global Battle of the Bands, og eru topptrimmaðir, hetta kann ikki annað enn verða gott. Byrjað verður kl. 23.30, ókeypis atgongd er til kl.. 24.00

**nud**